Eldraráðið í Tórshavnar kommunu
Tórsgøta 21, 100 Tórshavn
eldrarad@torshavn.fo

# Eldraráðið 2021 – 2024

**Fundir Nr. 05 2024**
**Dagfesting: Mikudagin 08-05-24 klokkan 13:00 – 14:30**
**Stað: Tilhaldið í Tórsgøtu**

Møtt: Katrin Holm, forkvinna, Robert Vilhelmsen, næstformaður, Julianna Klett,kassameistari, Petur Rouch, skrivari, og Marin Rasmussen, limur.

Á skránni.

1:Fundur um talgilt valg til Eldranevndina 2024-2027

2:Fundur um spyr.fo spurnarblað

3:Ymist

**Ad. 1 Fundur um talgilt val til val av komandi eldraráði.**

Klokkan 13 fingu vit vitjan frá fólki frá Tórshavnar Kommunu. Marjun Berg, Eyðfríð L. Jacobsen, Katrin Joensen og Rókur Tummasson. Hetta var ein vælkomin vitjan. Ørindini vóru at spyrja um okkara meining um, at valið til nýggja eldraráðið í heyst fer fram talgilt.

Vit tóku væl ímóti hugskotinum. Enn er fatanin tann, at eldri borgarin ofta ræðist talgildar skipanir, men hetta eru vit ikki samd í. Treyðugt so, at tað finnast eldri fólk, sum ikki eru so kunnug við talgildar loysnir, men tey fækkast í tali.

Okkum var upplýst, at neyv kunning verður áðrenn um, hvussu mannagongdin er. Eisini fæst hjálp til teirra, sum hava brúk fyri henni í Tilhaldinum, og hjálp fæst eisini í Snarskivuni. Hevur man ikki møguleika at fara heimanífrá, frá ber eisini til at fáa vitjan og leiðbeining.

Umframt upplýstu tey, at til komandi val av Eldraráði, vera fimm fastir limir og trý eykavald.

Ein góð og gevandi vitjan.

**Ad. 2 Spyr.fo**

Klokkan 13:30 fingu vit vitjan av Allan Dalsgarð frá spyr.fo.

Vit upplýstu, at Eldradagurin 2024 verður fríggjadagin 6. september í Dansifrøi.
Allan umboðar spyr.fo og tók á seg at gera ein spurnarkanning um bústaðarynskir hjá eldru borgarum í Tórshavnar.

Hann greiddi frá, hvussu kanningin fór fram, og vit gjøgnumgingu teir spurningar, vit mettu at vera relevantar fyri kanningina. Robert hevur gjørt eitt upplegg til spurningar. Hetta spurnarumfarið er ikki so víðfevnt sum Gallup kanningin frá oktober 2019, tí tað handlar fyrst og fremst um, hvørji ynski eldri frísk fólk hava um bústaðir í Tórshavnar kommunu.

**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

**Ad. 3 Ymist**

Fundarfrágreiðing 04-2024 var góðkend.

Næsti fundur verður hósdagin 6. juni 2024 klokkan 13 í Tilhaldinum.

Skrivað Petur Rouch 12. mai 2024.